# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg skammist av teimum prestum, sum gjørdu seg inn á børn, og kirkjan fer at gera alt fyri at lekja sárini*
*(Benadikt pávi)*

# Pávin vitjar Guðs egna land

**Benadikt pávi vitjar katólsku kirkjuna í USA, men hann skal eisini tosa um amerikanskan politikk**

George W. Bush, forseti, var í nátt á flogvøllinum í Washington og tók ímóti Benadikt páva, sum skal vitja sínar amerikonsku trúarfelagar teir næstu dagarnar.

Pávin fer uttan iva at tosa við kirkjuleiðsluna um tær nógvu gølurnar sum prestar, sum hava misbrúkt børn kynsliga, og sum hava skakað kirkjuna og amerikanska samfelagið síðani tær fyrstu avdúkingarnar í 2002.

Men politikkur stendur eisini ovasrlaga á skránni hjá pávanum. Hann skal tosa við George W. Bush, forseta um kríggið í Irak og um altjóða mannarættindi. Vatikanið var upprunaliga ímóti innrásini í Irak.

Eitt mál, sum Benadikt pávi eisini fer at tosa við Bush um, eru teir nógvu latínamerikonsku tilflytararnir í USA. Umleið 40 prosent av katolikkunum í USA eru latínamerikanarar, og nógvir teirra eru komnir ólógliga til landið.

- USA má gera alt fyri at forða harðskapi, so at innflytarar kunnu fáa eitt virðiligt lív, segði pávin, áðrenn hann fór til USA.



*Benadikt pávi millum erkabiskuppin Timothy P. Broglio og George W. Bush, forseta*
*Mynd: Polfoto*

# Løgreglan fær skyldina

**Svenska løgreglan er fyri hørðum atfinningum eftir morðið á Englu Høglund, og danska løgreglan kannar, um drápsmaðurin eisini kann hava myrt danskar kvinnur**



*Danska løgreglan kannar nú, um Anders Eklund kann hava framt morð har eisini*
*Mynd: Polfoto*

Løgreglan hevur skyldina av, at Engla er deyð. Tað halda fleiri sviar, og ein teirra hevur nú meldað løgregluna til umboðsmannin.

Sambært blaðnum Dalarnas Tidningar vil viðkomandi vera við, at hevði løgreglan gjørt sína skyldu, hevði drápsmaðurin hjá Englu Høglund verið tikin fyri fleiri mánaðum síðani. Í novembur í fjør fekk løgreglan eina ábending um, at tað var Anders Eklund, sum hevði beint fyri teirri 31 ára gomlu Pernille Hellgren í 2000, men løgreglan kannaði ikki ábendingina.

- Hevði løgreglan kannað málið tá, hevði Engla verið á lívi í dag, sigur maðurin, sum hevur meldað løgregluna, við Dalarnas Tidningar.

Svensku fjølmiðlarnir eru á einum máli um, at løgreglan hevur handfarið málið sera illa, og at fleiri teirra geva beinleiðis løgregluni skyldina av, at Engla Høglund er deyð.

- Nógv bendir á, at Engla hevði verið á lívi í dag, um løgreglan í Dalarna hevði tikið ábendingina í novembur í álvara, skrivar Dagens Nyheter.

### Fleiri morð?

Svenska løgreglan kannar nú, um Anders Eklund kann hava beint fyri øðrum enn Pernillu Hellgren og Englu Høglund. Millum annað veit løgreglan ikki, hvør myrdi ta 16 ára gomlu Malin Olsson í Gøteborg í 1994, ta 22 ára gomlu Helenu Andersson í Mariestad sama árið ella ta 31 ára gomlu Pernille Theorin í Falun í 2006.

Danska løgreglan hevur eisini áhuga fyri Anders Eklund, tí hann koyrdi lastbil fyri eina danska fyritøku eitt skifti. Millum annað ætlar løgreglan at kanna, um DNA-royndir av svenska drápsmanninum kunnu knýtast at morðunum á ta 37 ára gomlu Alice Kansiime í 1997, ta 20 ára gomlu Evu Christensen í 2001 ella Birthe Dannemann, sum varð funnin myrd í 1997.

Harafturat leitar løgreglan eftir tí, sum myrdi ta 35 ára gomlu Karinu Christensen í 2003, og løgreglan vil eisini fegin vita, hvat varð av teirri 48 ára gomlu Ullu Bødker, sum hvarv í Esbjerg í 1997.

**STUTT SAGT**

## Minnast Laiku

Tann 3. novembur í fjør vóru 50 ár liðin, síðani russar sendu eina rakett við tíkina Laika í ringrás um Jørðina, og nú hava teir reist ein minnisvarða til minnis um hana. Sjálvur minnisvarðin er ein stytta, sum ímyndar ein hund, sum stendur á einari rakett, og minniavarðin hevur fingið pláss uttan fyri rannsóknarstovuna, sum russiski herurin hevur í Moskva, tí tað var har, Laika bleiv fyrireikað til rúmdarferðina.

Ferðin hjá Laiku fekk stóran týdning, tí um tað mundið visti vísindin ikki, hvørja ávirkan umstøðurnar úti í rúmdini høvdu á livandi verur. Laika livdi sjey dagar í rúmdarfarinum, og hesar dagarnar kundu russiskir vísindamenn kanna, hvussu hon bleiv ávirkað av vektloysi og umstøðunum í rúmdini annars.



*Laika ikki í russisku rakettini í 1957*
*Savnsmynd*

## Krevja sømilig klæðir

Myndugleikarnir í Serbia fýlast á, at alt ov mong fólk í almennum starvi fara ov lætt um, hvussu tey umboða tað arbeiðið, tey hava. Tí hava myndugleikarnir nú givið øllum almennum starvsfólkum boð um, at tey skulu lata seg sømiliga í, áðrenn tey fara til arbeiðsis. Eitt nú verður sagt, at sum arbeiðsgevari kann tað almenna ikki góðtaka, at starvsfólk eru til arbeiðis í stuttum buksum. Í einum rundskrivi siga myndugleikarnir, at almenn starvsfólk handfara persónligar upplýsingar um borgararnar, og at hetta eru trúnaðarviðurskifti, sum skulu viðgerast og umsitast sømiliga. Umleið 250.000 serbar eru í almennum starvi.